# Arbeiðsósemja á Skála

**Skála Handverkarafelag hevur kært eina uppsøgn av handverkara á skipasmiðjuni til Føroya Handverkarafelag. Stjórin á Skipasmiðjuni vil ikki gera viðmerking til málið**

ARBEIÐSÓSEMJA
*Edvard Joensen*

Ósemja hevur tikið seg upp millum Skála Handverkarafelag og leiðsluna á Skipasmiðjuni Skála um ein uppsøgn. Leiðslan sigur grundina til uppsøgnina vera manglandi arbeiði. Handverkarafelagið heldur hinvegin grundina vera fakligan aktivitet. Maðurin, sum er sagdur úr starvi, er nevndarlimur í handverkarafelagnum. Málið er latið Føroya Handverkarafelag til viðgerðar.

Formaðurin í Skála Handverkarafelag, Harald Østerø, váttar, at felagið hevur boðað øllum limum sínum á skipasmiðjuni á fund orsakað av hesi uppsøgnini. Hann sigur, at felagið góðtekur ikki framferðina hjá leiðsluni. Hann heldur ikki, at tann uppsagdi maðurin er sjálvsagt val at siga upp, um grundin veruliga er, at arbeiði manglar.

– Eg kann ikki mótmæla eini uppsøgn, sum er grundað á, at einki arbeiði er. Men eg haldi, at handan uppsøgnin hevur støði í onkrum heilt øðrum, sigur Harals Østerø, formaður í Skála Handverkarafelag.

Hann sigur, at ymiskt bendir á, at tað er okkurt annað mál, sum fyrr hevur verið uppi, sum nú kemur nevndarliminum afturumaftur.

Av skrivstovuni hjá Føroya Handverkarafelag verður váttað, at tey hava fingið hetta málið av Skála til viðgerðar.

Málið skuldi takast upp á fundi týsdagin, og har skuldi eitt nú løgfrøðingur eisini vera við.

Gunnar Mohr, stjóri á Skipasmijuni á Skála, sigur við Sosialin, at hann hevur onga viðmerking til málið.



*Leiðslan á Skipasmiðjuni á Skála hevur sagt einum manni upp við manglandi arbeiði sum grundgeving. Fakfelag hansara metir, at sanna grundin er fakligur aktivitetur*

## Bústaðarpolitikkur í Miðvági



*Kvinnubólkurin i Vágum fer í heyst at skipa fyri trimum almennum fundum í bygdarskúlanum í Miðvági. Fyrsti fundurin verður mikukvøldið klokkan 19.00, har Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, fer at røða um bústaðarpolitikk*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Skipað verður fyri fundi um bústaðarpolitikk í bygdarskúlanum í Miðvági mikukvøldið. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, fer at røða**

KJAKFUNDUR
*Edvard Joensen*

Almennur fundur um bústaðarpolitikk verður hildin í skúlaauluni í Miðvági mikukvøldið klokkan 19.00.

Tað er kvinnubólkurin í Vágum, sum skipar fyri, og røðari á fundinum verður Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður.

Lagt verður upp til kjakfund, soleiðis at fundarfólkið fær høvið til at siga sína hugsan og seta spurningar, siga fyrireikararnir.

Kvinnubólkurin í Vágum fer at hava tríggjar tílíkar fundir í heyst, og teir verða allir hildnir í auluni í Miðvágs skúla. Umframt verður skipað fyri einum skeiði, har bara kvinnur hava atgongd.

Tann 29. oktober skipar Kvinnubólkurin fyri fundi um kommunusamanlegging. Har fer Hilmar Høgenni at tosa um fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging.

Tnn 17. november verður tað umhvørvið, sum verður til viðgerðar, og á tí fundinum verður Finnbogi Joensen høvuðsrøðari.

Skipað verður fyri skeiði í døgunum 22. og 23. oktober. Evnið á skeiðinum, sum verður hildið í kommunuhúsinum í Sandavági, verður um at tora at taka orðið.

Hetta skeiðið er bara ætlað kvinnum, siga fyrireikararnir. Tær siga, at hóast tað ofta verður hildið, at kvinnur tosað nógv og nógvastaðni, so vísir tað seg í mongum føri, at á størri samkomum o.t. eru tað fáar kvinnur, sum halda seg til at taka orðið. Eisini halda tær, at ov lítið sæst til kvinnur í politiska lívinum. Tað verið seg bæði kommunalt og í landspolitikki.

Tann, ið er áhugaður at frætta meira um tiltøkini hjá Kvinnubólkinum, kann venda sær til Kunningarstovuna í Vágum, siga tær, sum mynda bólkin.

# Sørvágs Kommuna veksur

**Um vikuskiftið varð gjørt av, at á nýggjárinum lækkar talið av føroyskum kommunum. Tá verður Mykines Kommuna partur av Sørvágs Kommunu**

KOMMUNUSAMANLEGGING
*Edvard Joensen*

**Sørvági:**
Á nýggjárinum verður Mykines partur av Sørvágs Kommunu. Avtala um samanleggingina varð undirskrivað um vikuskiftið.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, sigur, at avtalan, sum undirskrivað er millum Mykines og Sørvágs Kommunur, líkist avtaluni, sum Bíggjar Kommuna og Sørvágs Kommuna skrivaðu undir í summar.

Eitt fylgiskjal við ymsum ynskjum frá Mykinesar Kommunu hongur við sáttmálanum, sum nú er undirskrivaður, sigur Eivin Jacobsen.

Har er millum annað nevnt, at Sørvágs Kommuna átekur sær onkrar uppgávur, sum skulu gerast í Mykinesi.

Eitt nú verður nevnt, at vatn og kloakkviðurskiftini skulu bøtast, eins og skúlin eisini er nevndur, greiðir Eivin Jacobsen frá.

Mykines Kommuna eigur vatnreinsiverk og rør til leiðingar, men tað liggur alt ónýtt. So tað, sum nú er at gera, er mest graviarbeiði, sigur borgarstjórin í Sørvági. So er at finna útav, um kloakkskipanin ikki kann leggjast í somu grøv sum vatnleiðingin, sigur hann.

Skúlin í Mykinesi er ikki serliga væl útgjørdur. Eitt nú er ikki varmi í bygninginum, og tað verður væl tað fyrsta, sum har skal gerast. Undirvísingarskylda er, og skúlin skal vera tøkur til tess.

Í løtuni er eingin byggiætlan fyri Mykines. Tað er eitt mál, sum nýggja bygdarráðið væl saktans fer at gera nakað við heilt skjótt, væntar Eivin Jacobsen.

Í mun til avtaluna millum Bíggjar og Sørvágs Kommunur, hevur Mykinesavtlan tó tað frávik, at veljast skal ein staðbundin Mykinesnevnd at vegleiða bygdarráðnum í ymsum lokalum spurningum. Tað ynsktu tey ikki í Bíggjar Kommunu, sigur Eivin Jacobsen.

Avtalan um kommunsamanleggingina vestanfyri varð send Innlendismálaráðnum mánadagin, sum var seinasta freist, um samanleggingin skal fáa gildi frá 1. januar komandi.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági, hevur boðað frá, at hann stillar ikki upp aftur til kommunvalið, sum lýst er at verða tann 9. november.



*Mykines verður á nýggjárinum drigin nærri Sørvágsfirði. Tá verða báðar kommunurnar lagdar saman og fáa heitið Sørvágs Kommuna*

*Mynd: Edvard Joensen*





*Landsbankin er samdur við landsstýrismanninum, Bárði Nielsen, um, at tað er rætt at útvega so góð hagtøl sum gjørligt, og at ein størri og sterkari stovnur hevði verið viðvirkandi til hetta. -– Men vit halda tað ikki vera rætt at leggja stovnarnar saman í ein stovn, sigur Landsbankin*

Landsbanki Føroya:

# Heldur samskipan enn samanlegging

**– Vit meta, at vansar eru við at leggja Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya saman í ein stovn, sigur Landsbankin, sum leggur upp til, at stovnarnir heldur verða samskipaðir undir somu "fysisku" karmum enn beinleiðis lagdir saman**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsbankin er samdur við landsstýrismanninum, Bárði Nielsen, um, at tað er rætt at útvega so góð hagtøl sum gjørligt, og at ein størri og sterkari stovnur hevði verið viðvirkandi til hetta.

– Men vit gera vart við, at talan er um tveir stovnar, sum hava ymisk virkisøki. Landsbankin hevur sum virkisøki at vera fíggjarfyrisitingarstovnur fyri landskassan og at hava búskapareftirlit við føroyska samfelagnum. Hinvegin hevur Hagstovan til endamáls at savna og framleiða hagtøl. Landsbankin nýtir soleiðis tjóðarroknskaparhagtøl frá Hagstovuni til at gera metingar og forsagnir um føroyska búskapin, og Hagstovan hevur nýtt metingar hjá Landsbankanum í tjóðarroknskapinum, tá hagtøl hava vantað.



*– Samskipanin eigur at verða framd soleiðis, at greiður skilnaður framvegis verður millum virkisøkini hjá Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya, heldur Landsbankin sum tískil ikki tekur undir við regulerari samanlegging av stovnunum*

### Á einum staði

Landsbankin sigur, at fyri at styrkja samstarvið millum stovnarnar við meira rationellum og effektivum arbeiðsgongdum – umframt at fáa eitt sterkt fakligt umhvørvi – hava stovnarnir báðir seinastu tvey árini havt eina ætlan um samskipan, har stovnarnir koma at verða innan somu fysisku karmar.

– Landsbankin hevur tí arbeitt við ætlanunum um at keypa hølini hjá postverkinum á Argjum og síðan leiga Hagstovuni part av hesum hølum.

Sum skilst á Landsbankanum, hava báðir stovnarnir mett, at ítøkiligir fyrimunir fáast til vega við, at stovnarnir hava hølir saman.

### Ikki samanlegging

Landsbankin metir tó, at vansar eru við at leggja stovnarnar saman í ein stovn og leggur heldur upp til, at stovnarnir vera samskipaðir.

– Landsbankin eigur framvegis at verða óheftur av politisku myndugleikunum, og samskipanin eigur at verða framd soleiðis, at greiður skilnaður framvegis verður millum virkisøkini hjá Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya, heldur Landsbankin sum tískil ikki tekur undir við regulerari samanlegging av stovnunum, soleiðis sum landsstýrismaðurin, Bárður Nielsen, vegna landsstýri og samgongu hevur boðað frá.

## Bárður átalu um samanlegging

**Starvsmannafelagið átalar, at samanlegging av stovnum verður kunngjørd áðrenn tey, sum samanleggingin kemur at ávirka, fáa boð um tað**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Vit hava eina greiða áseting í sáttmálanum sum sigur, at okkara limir í góðari tíð skulu kunnast um avgerandi broytingar í arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum stovni, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

Í brævi til Bárð Nielsen, landsstýrismann, dagfest, 28. september, átalar formaður Starvsmannafelagsins, Gunnleivur Dalsgarð, framferðina í málinum um samanlegging av Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya.

Felagið vísir á, at ein slík samanlegging eisini kann koma at ávirka starvsfólkaviðurskiftini hjá limunum í Starvsmannafelagnum.

### Ásetingin

Í hesum sambandi vísir formaðurin, Gunnleivur Dalsgarð, til grein 2 í sáttmálanum sum sigur:

"Tá avgerandi broytingar verða gjørdar í arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum stovni, skal starvsfólkið hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi at verða við í tilrættaleggingini".

Starvsmannafelagið metir ikki, at henda greinin í sáttmálanum er fylgd.

- Vit átala, at fráboðanin um hesa stóru broyting fyrst verður almannakunngjørd áðrenn tey, sum broytingin kemur at ávirka, fáa boð um tað.

Felagið ger samstundis greitt og krevur, at nevnda sáttmálaáseting verður fylgd, soleiðis at starvsfólk eisini verða við í arbeiðnum at skipa ætlaðu broytingarnar longu frá byrjan av.

### Ótryggleiki

Í viðmerking annars, sigur Gunnleivur Dalsgarð við Sosialin, at tá ið ein samanlegging fer fram, og annar stovnurin heldur uppat, skapar tað sjálvsagt ein ávísan ótryggleika millum starvsfólkini.

- Tað er sum so ikki okkara borð, hvør verður leiðari á einum slíkum stovni, men vit hava sjálvsagt áhuga í, hvussu støðan hjá okkara limum verður.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at felagið hevur nakrar limir, sum starvast í Landsbanka Føroya og nakrar fleiri sum starvast á Hagstovu Føroya.

- Vit hava sum nevnt eina greiða áseting í sáttmálanum, og tí er tað ikki annað enn rímiligt, at okkara limir verða kunnaðir um broytingar í góðari tíð og eru við í "prosessini", sigur Gunnleivur Dalsgarð.